# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Amanda Jacobsen**, happadráttsseljari, ættað úr Saltangará búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 86 ára gomul. Kistan ferð úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl 17.00. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju fríggjadagin kl 13.00

**Anna Gardar Hansen** andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mánadagin, 78 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum hóskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni fríggjadagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Annu, kunnu lata eina gávu til Emmaus, konta í peningastovnunum.

**Jóhanna Mathea Skaale, Tórshavn**, andaðist 5. mai. Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum fríggjadagin klokkan 15. Tey, ið vilja minnast Johonnu, kunnu lata Ellisheiminum í Havn eina peningagávu, konta í Eik Banka.

# Føroya KFUK-skótar 80 ár



*Stásiligar vóru tær! Myndin er helst tikin einaferð í 50'unum. Ása Østerø við sínari patrulju*

9. mai 2008 eru áttati ár síðani KFUK-skótar vóru stovnaðir í Føroyum.

Av teimum fyrstu sum avløgdu lyftið hendan dagin kunnu nevnast:

Gunnhildur Evensen, Eva Thomsen, Liffa Gregoriussen, Aspa Poulsen og Thurid Waagstein.

At KFUK-skótar í ár hava virkað í Føroyum í áttati ár, eigur at hátíðarhaldast. Frá kl. 16 verður opið hús í KFUK í Havn, har øll sjálvandi eru hjartaliga vælkomin.

Vit hava samlað nakrar myndir av skótum frá øllum hesum 80 árunum, og gott hevði verið um onkur kundi komið at hjálpt okkum at sett navn a hesar myndir.

Dagbøkur frá øllum árunum liggja eisini frammi allan dagin. Ein drekkamunnur og okkurt gott afturvið, verður eisini at fáa og vit syngja og hoyra eitt sindur um skótarørsluna.

Vónandi eru nógvir fyrrverandi og núverandi KFUK-skótar, familjur og onnur, sum koma framvið í KFUK 9. mai millum 16 og 18.

## Takk



Øllum tykkum mongu, bæði nær og fjar, sum hvør á sín hátt vóru við til at gleða okkum og gera silvurbrúdleyp okkara so hugnaligt og minnisríkt, takka vit so hjartaliga.

**Blíðar heilsanir**
**Ann og Pauli Thomsen**

## Takkarkvøða

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, ið mintust meg á 90 ára føðingardegnum 16. febr. og gjørdu mær dagin ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur, fjarrit og uppringingar.

**Blíðar heilsanir**
**Sigga Hansen, Kollafjørður**

**Dagurin**
**9. mai. Kaspar.** Ein av teimum trimum heilagu kongunum. Føroyska navnið er Jaspur. Týdningurin er ókendur

## Tøkk

Vit vilja takka øllum hjartaliga, sum hjálptu okkum í sambandi við at mamma, svigarmamma, omma, langomma og systir okkara

**Katrin Jovina Skarðhamar**

bleiv jarðað sunnudagin tann 4. mai 2008.
Ein serlig tøkk til vakran sang í kirkjuni og til tykkum, sum vitjaðu hana, meðan hon lá sjúk fyrst í Føroyum, síðan á Ríkissjúkrahúsinum og á Herning sjúkrahúsi.
Takk til Árant Johannesen fyri troystarrík orð í kapellinum í Herning.
Takk til tykkum, sum ringdu, og tykkum, sum sendu blómur og tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum.

*Vegna tey avvarðandi*
**Heðin Skarðhamar**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin